# Til goymslu okkara

sóknast vit eftir einum røskum, fyrikomandi og álítandi fólki. Arbeiðið umfatar ordraavgreiðslu, útkoyring og annað goymsluarbeiði.

Viðkomandi skal kunna ganga inn í eina vaktarskipan, sum m.a. eisini umfatar náttararbeiði. Vaktarskipanin umfatar ikki vikuskiftisarbeiði.

Umsøkjarin má hava stórt koyrikort.

Skrivlig umsókn við prógvum og møguligum viðmælum verður at senda til P/f Poul Michelsen, Postrúm 200, FO-110 Tórshavn.

Um tørvur er á meiri kunning um starvið, ber til at ringja til P/f Poul Michelsen á tlf. 314650 og tosa við Gunnar Mohr, sølustjóra.

**P/f Poul Michelsen**

# Veitsla fyri støk

verður í B68-húsinum á Svangaskarði leygarkvøldið 27. mars 2004 kl. 20.00.

Á skránni verður:
- Døgurði
- Gott undirhald
- Dansur

Veitslan kostar kr. 250,00.
Við gisting og morgunmati kr. 350,00.

Tú tryggjar tær atgongumerki við at gjalda inn á konto 6460 162.008.2 í Føroya Banka seinast týsdagin 23. mars.

*Aldursmark 30 ár.*

# Stórkapping

Seinra Stórkappingin í rytmiskum fimleiki verður í Ítróttarhøllini í Runavík

**sunnudagin 14. mars kl. 14.30**

Kappingin verður hjá pinkum og gentum. Kvinnuliðini frá 6. mars vera við og gestalið frá Greve.

Tombola, kaffisøla v.m. verður í gongini frá kl. 13.00.

**Føroya Fimleikasamband**

# Bygdarhúslimir

Seinasta freist at tekna seg til veitsluna 20. mars er mánadagin 15. mars á middegi.

**Bygdarhúsfelagið í Leirvík**

# Útbjóðing

Í samband við **útbygging av Eysturoyar Røktar og ellisheimi** verður hervið boðið út alment í høvuðsarbeiðstøku.

**Timburarbeiði**
**Snikkaraarbeiði**
**Múraraarbeiði**
**Málaraarbeiði**
**Gólvleggingararbeiði**
**Lendisarbeiði**
**Hitaverk,sanitet og ventilatión**
**El-arbeiði**

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast til í seinasta lagi mikudagin 17. mars við at gjalda kr. 5.000,- í veðhaldi á konto 6460-165 7404 í Føroya Banka.

Tilboð skulu, saman við útbjóðingartilfarinum, latast inn á Eysturoyar Røktar og ellisheim í Runavík (starvsfólka matstovan) í afturlatnum brævbjálva merktur:

**Útbygging av Eysturoyar Røktar og ellisheimi Tilboð**

í seinasta lagi hósdagin **22. apríl 2004, kl. 1400.**

Boðini verða tá latin upp og kunnu teir bjóðandi verða hjástaddir.

**sp/f Teknistovan**
v. Jens Kl. Jacobsen og Henning Olsen
ráðg. Byggifrøðingar
FO- 510 Gøta
tel: 44 21 05 · fax: 44 21 07
email: klement@post.olivant.fo

# Stuðulsfólk

Søkt verður eftir einum stuðulspedagogi/hjálpara til 13 ára gamlan drong í Klaksvík at byrja 1. apríl 2004.

Arbeiðið hjá stuðlinum er í samstarvi við drongin og stuðlsráðgevan at stuðla dronginum í at fáa ein innihaldsríkan dag.

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna og er fyribils játtað til 1. februar 2005.

Ynskiligt er at tann ið settur verður, hevur hóskandi útbúgving ella royndir.

Setanin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til jóruna Niclasen, stuðuslráðgeva ella Súsonnu Gaard, sosialráðgeva.

Umsóknir við møguligum avritum av prógvi vera at senda til:

**Barnaverndarnevndina**
Klaksvíkar Kommuna
postboks 2 · FO-700 Klaksvík

í seinasta lagi 22. mars 2004.

# Sethús í Tvørgøtu 27, Tórshavn til sølu



Húsini eru í 3 hæddum, hvør 50 fermetrar.

Grundøkið er 158 fermetrar.

Á loftinum eru 3 kømur, baðirúm og gongd.

Í miðhæddini eru køkur við nýggjum hvítvørum og borðplátum, 2 stovur og gongd.

Í kjallarahæddini er sjálvstøðug íbúð við kamari, stovu, køki, wc, baðirúm og gongd.

Í tilbygninginí er stórur hjallur og fýr- og vaskirúm.

Uttanfyri húsini er urtagarður og stoyptur garður er runt um húsið.

Húsini standa í barnavinarligum, friðarligum, veðurgóðum umhvørvi og tó bert 5 min. frá miðbýnum.

Myndir av húsinum kunnu síggjast á www.vitin.fo.

Til sølu um hóskandi boð fæst.

Áhugað kunnu venda sær til:

**Tlf. 313858 ella 553355**

# Diabetesfelag Føroya

Aðalfundur felagsins verður í MBF-húsinum

**sunnudagin hin 28. mars kl. 15**

Skrá sambært lógum felagsins.

Eftir aðalfundin verður frágreiðing um lívstryggingarviðurskifti í samband við diabetes.

**Nevndin**

# Ferðavinnan í Suðuroy

Ársaðalfundur felagsins verður í skúlanum í Hovi onskvøldið 31. mars kl. 19.00.



# Kunngerð
## um broyting av Bygdarplaninum fyri Oyndarfjarðar Kommunu

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 seinast broytt 13. mai 1997, verður við hesum boða frá, at bygdarráðið á fundi 09/03-04 hevur viðtikið at gera broytingar í bygdarplaninum í Oyndarfirði.

Broytingin umfatar nýtt E-øki á J-øki vestan- og sunnarfyri Oyndarfjarðar skúla og umfatar broytingin hesar matriklar:

**Matr. nr. 14ª, matr. nr. 66 og matr nr. 139 Oyndarfjarðar bygd.**

Broytingarnar eru til skjals í Gamla skúla mánadagfríggjadag frá kl. 8.00-21.00 frá 12. mars til og við 2. apríl 2004.

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot skulu vera bygdarráðnum í hendi í seinasta lagi 12. juni 2004.

Oyndarfjørður, tann 10/03-2004

**Oyndarfjarðar bygdarráð**

# Koyrikort?

Nýggj teoriskeið byrja
**mánadagin 15. marts**
kl. 17.30 til persónbil
kl. 19.30 til lastbil, trailara og buss
og **týsdagin 16. marts**
kl. 19.30 til motorsúkklu

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

John A. Christiansen
koyrilærari
tel 21 47 75

Stanley A. Olsen
koyrilærari
tel 21 10 99

**Jekaragøta 10 • Tórshavn**

# BILUR TIL SØLU

Kia Sportage (vøruvognur)
· diesel
· 4 hjóls trektur

**Tel 31 51 30**

## Heimarøktin í Suðurstreymoy

# Summarfrítíðar-avloysarar

Søkt verður eftir avloysarum fyri sjúkrarøktarfrøðingar, heilsurøktarar og heilsuhjálparar frá 15. juni til 31. august 2004 at arbeiða í Heimarøktini í skiftandi vaktum og 3. hvørt vikuskifti.

Heimarøktin veitir tænastur dagliga millum kl. 8.30 og 23.30

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til økisleiðaran á tlf. 31 72 49 kl. 9-11

Lønar- og setarnartreytir sambært sáttmála millum fíggjamálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir saman við avritið av prógvum og upplýsingum um arbeiðsroyndir og upplýsingar um ynskiligar arbeiðstíðir skulu stílast og sendast til.

**Heimarøktin Suðurstreymoy**
Att. Økisleiðarin Anna Maria Oskarsson
Skálatrøð 14,
Fo-100 Tórshavn.

Umsóknarfreistin er 29. mars 2004

# Alt til grill- og kantinuútgerð

skaffast, nýtt og brúkt.

Eisini fæst ís- og saftmaskina.

Umframt eykalutir

**Ingi Andreasen**
Tel 444 619 ella 25 89 61
teldupost: ingi@online.fo

# Eykalutir til bilar

Eykalutir og alt annað til bilar, eisini til US bilar, fáast fyri ein bíligan pening.

Bilarnir koma vanliga úr Týsklandi og Hollandi.

Alt pappírsarbeiði verður avgreitt.

Send ein teldupost við tygara ynskjum.

**Finn Nielsen**
Tel (0045) 23 44 07 25
finn@usparts.dk · www.usparts.dk

# Skrivstovufólk

Lýst verður við hesum eftir skrivstovufólki til Ítróttasamband Føroya

**Starvið**
Uppgávurnar vera í høvuðsheitum:
- móttøka av posti hjá ÍSF og nøkrum av sersambondunum
- málsviðgerð
- samskifti við ítróttarfeløg
- ymsar aðrar skrivstovuuppgávur

**Førleiki**
Vit vænta okkum m.a., at tú:
- hevur áhuga fyri ítrótti
- hevur hóskandi útbúgving, t.d. skrivstovu- ella miðnámsútbúgving
- hevur góðan kunnleika til vanlig telduforrit
- hevur føroyskan og enskan málkunnleika
- kanst arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni

Tað er ein fyrimunur, men ikki ein treyt, at tú hevur royndir innan ítróttararbeiði sum leiðari/venjari.

**Vit bjóða**
Eitt avbjóðandi og sjálvstøðugt starv innan ítróttarrørsluna
Møguleikar fyri skeiðluttøku
Løn sambært avtalu

**Umsókn**
Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu vera ÍSF í hendi í seinasta lagi **hósdagin 25. mars 2004.** Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknir skulu sendast til:
**Ítróttasamband Føroya**
Postsmoga 1081
110 Tórshavn

Miðað verður eftir, at starvið verður sett sum skjótast.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sølva Reinert Hansen, ítróttaráðgeva, á tel. 221226 ella við teldubrævið til srh@isf.fo

**Ítróttasamband Føroya**

*Ítróttasamband Føroya er landsfelagsskapur hjá ítróttarfeløgum kring landið. Felagsskapurin telur 110 ítróttarfeløg, ið eru skipaði í 15 ser- og deildarsambond.*

# Partabræv

til sølu fyri hægstbjóðandi.

**Tlf. 777211**

# Arbeiðshandskar
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi

Landsins størsta úrval
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

Beinleiðis frá framleiðara

ADC-Heilsølan spf
Lúarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo